# NØVN Í VIKUNI

Telefon 341800 - Fax 341801 - Fartelefon 216135
e-mail: maggi@sosialurin.fo

Á hesum síðum bera vit tíðindi um merkisdagar, so sum rundar føðingardagar, brúdleypsdagar, starvssetanir o.t.

## Mikkjal á Bergi sjeyti



18. juni 1935 fingu Betta og Sámal Jacobsen (seinni á Bergi) eitt dreingjabarn. Hann fekk navnið Mikkjal Jacobsen.

Soleiðis æt hann í nøkur ár, inntil hann fekk føroyska mergjaða navnið Mikkjal á Bergi, sum gjørdist kent bæði her og aðrastaðni.

Eftir loknað skúlagongd, har hann øll árini lá væl frammi í oddinum, fór hann í læru á skrivstovuni hjá P/f J. F. Kjølbro. Her tænti hann trúfast. Hann arbeiddi eisini eitt skifti m.a. úti á Skála, har Kjølbro hevði eitt stórt virki tá.

Eftir at Mikkjal hevði verið í Danmark á keypmannsskúla, var hann í tvey ár leiðari á Klædnabúðini, sum tá taldist millum landsins fremstu.

Eftir hesi tvey árini fór hann aftur á skrivstovuna við ábyrgd fyri kunda-, og viskiftafólkabókhaldinum.

### Boð vóru eftir honum

Hetta starvið røkti hann, til honum varð boðið starv í Norðoya Banka, sum var deild av Sjóvinnubankanum.

Í sjeytiárunum fekk hann starv sum roknskaparleiðari hjá Klaksvíkar Býráði, til hann í áttatiárunum tók við starvi sum bókhaldari hjá Com-Data.

Í djúpu kreppuni fyrst í nítiárunum var Com-Data noytt til at skerja sítt virksemi, og fyri hesum fall Mikkjal.

### Gavst ikki á hondum

Hann var tá komin eitt sindur til árs, men segði, at "eingin skuldi fáa seg at fara í nakra sosiala skipan". Tók tí súkkluna, fór til Danmarkar, fekk sær starv á fiskavirki, fór síðani til Noregs og so til skips.

Soleiðis lívbjargaði hann sær í nøkur ár, inntil hann kom aftur til Føroya, har hann síðani hevur verið bókhaldari hjá Norðoya Blikksmiðju.

Ein og hvør av okkum hevur nógv at læra av Mikkjali bæði á hesum og á øðrum økjum.

### Fjølvirkin

Mikkjal giftist við Judith Steensen hjá Honnu og Eskild í 1961. Tey fingu børnini Beintu, sum er sjúkrasystir og Eyðun, sum hevur verið sjómaður og er skipari á Akraberg. Eyðun er giftur við Johannu (fødd Vang).

Judith og Mikkjal eiga trý barnabørn, Mikkjal, Randi og Jónas.

Fáur hervur verið arbeiðssamari og meiri fjølvirkin enn Mikkjal. Hann hevur altíð verið til dystin fúsur.

Í fimtiárunum spældi hann við KÍ. Eisini har var boð eftir honum frá merkismanninum John Reid Bjartalíð til at skriva plakatir, sum rættiliga nógv varð gjørt við tá.

Um hetta mundið var á heilt øðrum bógvi gjørt átak í Útvarpi Føroya, sum æt "Ungfólk úr Klaksvík syngja og spæla", sum Malvinus Joensen hevði gjørt avtalu við Niels Juel Arge um at fremja. Mikkjal var upptøkumaður við sínum tvísporaða Nordmende og Proton banduppttakara.

### Dyggur verkamaður í samkomuni

Betesdakórið hevur notið gott av hansara arbeiðsemi, og hann hevur eitt nú hildið væl skil á uppmøtingarprotokollini í eini 30 ár, umframt at hann hevur verið í kórinum í upp ímóti 50 áruumm.

Á trúboðanarøkinum hevur Mikkjal verið ein álitismaður, ein verkamaður, sum hevur verið við til at halda samband við trúboðarar um allan heim.

Samkomulívið, bæði hjá Judith og Mikkjali,hevur ikki verið bert onkursvegnað, men hevur verið teirra akkerspláss. Tá tey ikki hava verið til møti, er okkurt áfatt.

### Tøkk og mong góð ár

Mikkjal, tú hevur verið ein brandur. Tøkk fyri ta hjálp og tann stuðul tú vart fyri meg frá ungum av, bæði tá vit samstarvaðu hjá J. F. Kjølbro, í kórinum, í samkomuni og á so mangan annan hátt.

Her verður ikki pláss fyri meiri, men Betty, eg og øll mín fjølskylda ynskja tær hjartaliga tillukku við teimum sjeyti, Harrans signing í komandi døgum og nógv góða ár. Tøkk fyri, tað tit hava verið fyri okkum. - Vit hava fingið mong „pragtfull" ár saman, og vónandi fáa vit fleiri.

Bestu heilsanir

**Betty og Jógvan við fjølskyldu**

†

### Andlát og jarðarferðir

Hans Clementsen, vanliga nevndur Hans í Andarisa, ættaður av Sandi, búsitandi á Seyðisfirði, andaðist 13. juni, 85 ára gamal. Jarðarferðin verður úr kirkjuni á Seyðisfirði leygardagin 18. juni.

Esbern Michael Magnussen, ættaður úr Froðba, búsitandi í Havn, andaðist á Landssjúkrahúsinum 14. juni, 92 ára gamal. Farið verður úr Landssjúkrahúskapellinum hóskvøldið klokkan 18. Jarðarferðin verður úr kirkjugarðskapellinum fríggjadagin klokkan 13. Sungið verður úr sálmabókini.

*Kelda: Útvarp Føroya*

### Dagurin

**17. juni. Bótolvsøka** ella **bótolvsmessa**. Munkurin Botolphus stovnaði kleystur í Lincolnshire í Onglandi, og býurin Boston eitur eftir honum. Hann doyði umleið ár 680. Navnið Bótolvur ella Bótal hevur verið brúkt sum mansnavn í Føroyum og kemur fyri bæði í samband við jørð og útróðrarmið.